## Leita eftir skjaldbøku í Klaksvík



Í Klaksvík hava summi annað enn Summarfestival at hugsa um. Norðlýsið.fo veit at siga, at í Klaksvík er ein sonevnd sump-skjaldbøka burturblivin og at leitað verður eftir henni. Hon er blivin burtur við húsini undir Klakki 14. Skjaldbøkan er á leið 15 - til 18 cm til longdar.

## Jógvan vitjar Kall í Klaksvík

Fríggjdagin 3. august millum kl. 14.00 til 15.00 vitjar Jógvan Hansen í Kall Handlinum í Klaksvík. Hann fer at práta við fólk og skriva autografar. Jógvan er í Føroyum í sambandi við Summarfestivalin í Klaksvík. Saman við sær hevur hann fleiri av somu íslendskar tónleikarunum, sum spæla á fløguni hjá honum. Konsertin við Jógvan á Summarfestivalinum verður kl. 24.00 fríggjakvøldið. Í sambandi við tiltakið í Kall Handlinum í Klaksvík fríggjadagin verður fløgan seld fyri 150,00.

# Salka Valka aftur í føroyskum sjógvi

**Salka Valka er umvæld og er sum nýggj, men tá Robert Østborg keypti Sølku Vølku í Oslo, var ikki nógv gott eftir av stolta farinum, sum Durita Holm á sinni førdi um heimshøvini**

VIT VITJA SØLKU VØLKU




*orð: Dagfinn Olsen*
*Myndir; Jens Kr. Vang*




*Meðan myndamaðurin fer í lítlu jolluna, ið hongur aftur Sølku Vølku, og rør út á Vestaru Vág fyri at taka myndir av bátinum, greiðir Robert frá, at hann nú leggur leiðina heimaftur*

Salka Valka er kend millum føroyingar, tí við hesum farinum sigldi Durita Holm um heimshøvini. Filmur og bók eru gjørd um ferðina, sum tískil er fest í huga føroyinga.

Salka Valka hevur í hesum døgum ligið í Vágsbotni. Tað er norðmanninum Robert Østborg fyri at takka, tí hann keypti Sølku Vølku í Oslo, men tá var lítið gott eftir av henni, og hevði hann ikki keypt hana, so hevði hon helst verið vrak í dag.

Robert Østborg er kendur í Føroyum og hevur vitjað her fimm ferðir, men tá við øðrum bátum. Í dag fegnast hann um, at hann kann koma við søguríka farinum til Føroya.

### Broytt

- Durita seldi bátin í Oslo, men tá eg keypti Sølku Vølku, var hon illa farin. Eg havi nú høvuðsumvælt Sølku Vølku, og nógv er skift út, sigur Robert, og leggur afturat, at hann er tann 3. í røðini av eigarum, ið eitur Robert.

Salka Valka er nakað broytt í útdsjónd, og serliga er tað stýrhúsið, sum er komið afturat, ið broytir myndina.

- Fólk hava ilt við at trúgva, at hetta er sami bátur, sum Durita Holm gjørdi kendan, sigur Robert Østborg, sum hevur ferðast við bátinum til ymsar føroyskar havnir, nú hann hevur verið í Føroyum í summar.

Hann er úr Sagvåg í Noreg og í gerandisdegnum er hann byggiharri.

Robert vísir fegin skipið fram og hann hevur dreymar um, at Salka Valka kann nýtast at sigla við føroyingum í norska skergarðnum, tí sum hann sigur, so eru føroyingar sera ofta í Noreg og fleiri vitja við smábátum.

- Salka Valka er óivað í betri standi nú, enn nakrantíð áður, sigur Robert.

### Rósar farinum

Robert Østborg er einsamallur á ferðini til Føroya við Sølku Vølku. Hann vísir fegin skipið fram, tá vit vitja umborð.

Hann rósar farinum.

- Salka Valka er sera sjógott far, sigur hann, meðan hann tekur harmonikuna eftir áheitan frá myndamanninum, og brátt ljóða tónarnir til Sildavalsin í nýggja stýrhúsinum á Sølku Vølku.

Serstakt við Sølku Vølku er, at skrokkurin er úr betongi. Fleiri bátar eru av hesum slagnum, men góðskan er ójøvn, men Salka Valka er bygd á skipasmiðju í Onglandi ´í 1978, og góðskan er í lagi, sigur Robert.

### Aftur til Noregs

Meðan myndamaðurin fer í lítlu jolluna, ið hongur aftur Sølku Vølku, og rør út á Vestaru Vág fyri at taka myndir av bátinum, greiðir Robert frá, at hann nú leggur leiðina heimaftur.

- Eg fari inn á Tvøroyri og leggi meg har at bíða eftir røttu líkindunum til heimferðina til Noregs, sigur Robert Østborg, sum tó sigur, at hann heilt víst ætlar sær aftur til Føroya, og at hetta tískil ikki er síðstu ferð Salka Valka er at síggja í føroyskum sjógvi.




*- Eg fari inn á Tvøroyri og leggi meg har at bíða eftir røttu líkindunum til heimferðina til Noregs, sigur Robert Østborg, sum tó sigur, at hann heilt víst ætlar sær aftur til Føroya, og at hetta tískil ikki er síðstu ferð Salka Valka er at síggja í føroyskum sjógvi*



*- Salka Valka er sera sjógott far, sigur hann, meðan hann tekur harmonikuna eftir áheitan frá myndamanninum, og brátt ljóða tónarnir til Sildavalsin í nýggja stýrhúsinum á Sølku Vølku*



*Tveir seglbátar úr Póllandi komu í Vágsbotn mikudagin. Teir komu úr Íslandi og róstu ikki ferðini, tí veðrið var ikki av tí besta*